Fylgiskjal 12

Uttanríkis- og Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15
Postrúm 347
110 Tórshavn

Tórshavn hin 25. juli 2026

Hoyringsskriv

Við hesum letur Suðurstreymoyar Útróðrarfelag Uttanríkis- og Fiskimálaráðnum hoyringsskriv í samband við

uppskot til Løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5B fyri fiskiárið 2026

Við uppskoti til løgtingslóg dagfest hin 21. mars 2026 hevur Uttanríkis- og Fiskimálaráðið sent útvaldum pørtum nevnda uppskot til hoyringar.
Uppskotið leggur upp til serstaka løgtingslóg einans galdandi fyri 2026, har 750 eyka fiskidagar verða tillutaðir bólki 5B fyri 2026.

Innleiðandi verður Uttanríkis- og Fiskimálaráðið við hesum kunnað um, at Suðurstreymoyar Útróðrarfelag ikki er limur í hvørki Føroya Reiðarafelag ella Meginfelag Útróðrarmanna, umframt at vit hvørki hava fastan ella eykalim í fiskivinnuráðnum. Tó, at vit sum felag í dagsins Føroyum umboða ein heilt stóran part av útróðrarbátunum í Føroym og eru langt stórsta útróðrarfelag í Føroyum - í mun til t.d. MÚ sum meira umboðar bólk 4 og deils partar av 5A.
Við hesum verður tí umbøn send Uttanríkis- og Fiskimálaráðnum um í framtíðini eisini at venda sær til Suðurstreymoyar Útróðrarfelag sum hoyringspart, tá fiskivinnumál sum ávirka okkara limir eru á skrá.
Hetta málið, sum ávirkar okkara limir meira enn nakran annan, er m.a. eitt serstakliga gott dømi um mál, sum átti at verði sent okkum til hoyringar.

Vit meta tað eisini átaluvert, tá Uttanríkis- og Fiskimálaráðið ásetir eina ummælistíð upp á einans fýra (4) dagar.

Hoyringsskriv:
Sagt verður frá, at Suðurstreymoyar Útróðrarfelag tekur undir við uppskotinum sum tað fyriliggur.
Tað sagt, er tað tó okkara metan, at málið gott kann avgreiðast við kunngerð innanfyri heimildinar í lóg um sjófeingi.

Viðmerkingar og hagtøl

Fyrst og fremst verður víst á, at bólkur 5 er skorin um 70% í fiskidøgum síðani fiskidagaskipanin kom í gildi í 1996, uttan at nakað annað av rættindum er latið til bólkin, og hóast bátatalið enn er um tað sama ella eitt sindur lægri. Hetta skal síggjast í mun til allar hinar bólkarnar í fiskivinnuskipanini, sum hava fingið fitt av øðrum rættindum á leiðum uttanfyri Føroyar og hava fingið makrelkvotu at 'styrkja' og endurnýggja seg við, umframt at skipatalið er minkað fitt. Tá er eyðsæð at síggja, at bólkur 5 sum heild er tann, sum 'alt í alt' er skerdur nógv mest.

Sambært hagtølum fyri 2026 hava 342 ymsir útróðarbátar í bólki 5B verið til útróðar og avreitt ein ella fleiri túrar í 2026.
Talan er um tilsamans 3.250 veiðitúrar, sum er samanfallandi við brúkta fiskidagatalið hjá bólk 5B, tí ein avreiðing telur ein fiskidag, óansæð um veiðitúrurin vardi í t.d. ein tíma ella í t.d. 36 tímar.
Veiðan frá hesum veiðitúrum er tilsamans 1.432,7 tons av fiski. T.e. 440 kg av fiski fyri hvønn veiðitúr, avreiðing og fiskidag.
Við øðrum orðum merkir tað, at teir 750 eyka fiskidagarnir, sum uppskotið leggur upp til, sambært verandi hagtølum fyri 2026 fara at hava við sær eina eyka veiðu upp á 330 tons av fiski - væl at merkja um allir fiskidagarnir verða brúktir.
Tað er so nøkulunda sama nøgd av fiski, sum ein einkultur av øllum teimum norsku línuskipunum, sum fyri tíðina liggja og veiða fram við føroyska 6fj markinum, fiskar ein einkultan túr upp á tveir mánaðir undir Føroyum.

So er tað tað: Er tað ikki púra natúrligt, at einhvønn føroyingur heldur eigur at unna 342 føroyskum útróðrabátum og manningum teirra hesa fiskinøgd enn t.d. einum einkultum norskum línuskipið, sum júst nú liggur og fiskar somu nøgd framvið føroyska 6fj markinum? - Tað halda vit í Suðurstreymoyar Útróðrarfelag í øllum førum, og tað halda vit, at Uttanríkis- og Fiskimálaráðið og Løgtingið eisini eiga at halda!
NB. Norsku línuskipini síggjast á digitalu miðlunum, sum vísa fiskiskipinum á føroyska sjóumveldinum; Vørn sær hesi sjálvsagt eisini.

Tilmæli:
Okkara tilmæli til Uttanríkis- og Fiskimálaráðið er, at Ráðið skjótast møguligt sendir uppskotið, sum tað fyriliggur, í Løgtingið til støðutakan.

Vinarligast
Suðurstreymoyar Útróðrarfelag
Jógvan Trondesen Andreasen, formaður